Løgtingslóg

um

broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Nágreinan av § 119, stk. 1)

§ 1

Í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019, verður § 119, stk. 1, 1. pkt. orðað soleiðis:

"Tann, sum antin fremur harðskap, hóttir við at fremja harðskap, ella sum alment ella við stórari útbreiðslu í hyggju setir fram hóttan um harðskap ímóti persóni, ímeðan ella í sambandi við, at hesin persónur útinnir honum alment álagda tænastuskyldu ella starvsskyldu, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 8 ár."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 6. oktober 2020 við 33-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 6. oktober 2020

stjóri

lm nr. 14/2020